Tjóðveldi

Løgtingið

Løgtingsmál nr. 142/2011: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2012-4

Uppskot
til
eykajáttanarløgtingslóg
fyri mars 2012 - 4

§ 7. Mentamál

A. Yvirlit

Játtanar yvirlit

Tús. kr.	Netto	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðsluætlan	500	500	-
Løgu ætlan	-	-	-
Útbúgving og gransking		**500**	**-**
7.23.2. Fólkaskúlin v.m.....		500	-

B. Játtanir

		Útr.	Innt.
		- Tús. kr. -	
7.23.2. Fólkaskúlin v.m.			
23.2.04. Stuðul til eftirskúlar (Rakstrarj.)	J:	-	-
	EYJ:	**500**	**-**

Viðmerkingar:
Ætlanin við hesum uppskoti er at fáa sett skjøtul á arbeiðið við eftirskúlaverkætlanini í Suðuroynni. Fyri at koma víðari í arbeiðinum er neyðugt at nágreina og eftirmeta eftirskúlaverkætlanina, nú so long tíð er gingin, síðan lógin bleiv samtykt. Peningurin, sum nú verður umbiðin, skal brúkast til, at nevndin fyri eftirskúlan og Mentamálaráðið kunnu gera eina ítøkiliga ætlan, sum skal innihalda staðseting, fígging og innihald soleiðis, at ein nágreinilig ætlan kann leggjast fyri Løgtingið til støðutakan.

Málið um eftirskúla í Suðuroy tykist onkursvegna vera dottið burtur ímillum í Mentamálaráðnum og politisku skipanini. Hetta er undrunarvert, tí fyri fleiri árum síðani hevur verið boðað frá semju um hetta mál frá kommununum í Suðuroy og frá báðum felagsskapunum fyri kommunur í Føroyum.

Hartil er ørgrynna av jaligum stuðulsváttanum stútt og støðugt veittar verkætlanini. Bæði á tingi, í fjølmiðlunum – og ikki minst í blaðnum "Eftirskúlin", sum reglugliga er givið út.

Í svari upp á munnligan fyrispurning 8. februar 2012 vísti landsstýrismaðurin á, at áleið 80 næmingar árliga fara uttanlands á eftirskúla. Stórt tilfeingi, menniskjaliga og fíggjarliga, fer sostatt av landinum á hvørjum ári. Sjálvsagt ber ikki til at siga, um hesi øll høvdu farið á eftirskúla í Suðuroynni, men hinvegin ber heldur ikki til at útiloka, at um tilboðið var tilstaðar, at ikki enn fleiri høvdu tikið av. Harumframt høvdu føroyskir ungdómar, búsitandi uttanlands, møguliga eisini komið higar á eftirskúla. Hetta fyri at knýtt enn tættari bond til familju, okkara mál og mentan.

Vinnulívsfólk, lærarar, fakfelagsleiðarar, námsfrøðingar, politikarar og áhugað annars bæði úr Føroyum og uttanlands hava skrivliga víst á allar teir fyrimunir, ið ein eftirskúli í Suðuroynni fer at hava. Fyri næmingar, fyri føroyskan skúlaskap, fyri lokalsamfelagið og fyri búskapin og samfelagið alt.

Eitt uppskot til samtyktar frá Sjálvstýrisflokkinum á tingi um at fremja ætlanina fekk eisini breiða undirtøku og semju á tingi í 2009.

Vit eru í tí støðu, at fráflyting er í landinum, og fólkatalið tískil minkar. Somuleiðis vita vit, at yngri fólk eru, tá ið tey flyta, verri eru útlitini til, at tey flyta heimaftur. Við at hava góð og mennandi útbúgvingartilboð í Føroyum kunnu vit vera við til at minka um hesa óhepnu gongd.

Tí er týdningarmikið at fáa greinað, hvussu vit koma víðari við málinum soleiðis, at samstarvspartarnir í ætlanini vita ítøkiliga, hvør politiski viljin er, og hvussu eftirskúlaverkætlanin kann gerast veruleiki. Hetta skal nevndin gera í samráð við Mentamálaráðið.

Nevndin fyri eftirskúlan er nýliga víðkað, og umboðini eru nú:
Ólavur Rasmussen (formaður), Herálvur Jakobsen (formaður í Føroya Lærarafelag), Magna Thomassen (formaður í Skúlaleiðarafelagnum), Gunnvá við Keldu (Kommunusamskipan Føroya) og Ásbjørn Djurhuus (Kommunufelagið).

Á Løgtingi, 28. februar 2012

Høgni Hoydal	Sirið Stenberg	Páll á Reynatúgvu
Bjørt Samuelsen	Gunvør Balle	Kristina Háfoss